ítróttur

Nr. 148 • mikudagur • 7. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# GÍ vann í Havn

**GÍ vann sunnudagin fyrsta landskappingardystin í ár**

1.DEILD KVINNUR
*Páll Holm Johannesen*

Heldur óvæntað fóru gøtukvinnur avstað við øllum trimum stigunum í Gundadali sunnudagin. Dysturin endaði 3-2 til GÍ, eftir at GÍ hevði verið á odda 2-0 í hálvleikinum. GÍ hevur ikki staði seg so væl í landskappingini higartil, og tí væntaði fáur, at tær fóru at gera teir stóru skreytirnar í Gundadali sunnudagin.

HB manglaði fleiri leikarar til dystin sunnudagin, og høvdu bert tann spælaran á beinkinum. Fyri nevna nakar, kunnu, Gunn Muller, Eydna Skaale og Eyðvør Thomsen, sum allar hava verið høvðustuðlar á HB-liðnum í ár.

### GÍ betri í fyrra hálvleiki

GÍ hevði leikliga yvirvág í fyrra hálvleiki, og høvdu fleiri naskar royndir á HB-málið. Serliga var GÍ-framherjin Heidi Heinesen, ein støðug hóttan hjá HB-verjuni. Tað var eisini sama Heidi, ið miðskeiðis í fyrra hálvleiki varð feld inni í HB-brotsteiginum, og dómarin var eirindaleysur, og dømdi brotsspark.

GÍ-málverjin, Anna Kristina Joensen varð sett at skjóta, og hon setti bóltin trygt í netið. Løtu seinni var Heidi Heinesen aftur uppá spæl, eftir hornaspark, var hon fyrst á bóltinum, og kundi økja um GÍ-leiðsluna.



*Eyðvør úr Dímun leikti sín fyrsta dyst í yvir eitt ár- og skeyt mál, men tað rakk ikki til sigur hjá HB-kvinnunum ímóti GÍ sunnudagin.*
*Mynd: Savnsmynd*

2-0 til GÍ varð eisini hálvleiksstøðan.

### HB uppá javnt

Havnarkvinnur løgdu nógv bragdligari fyri í seinna hálvleiki. Nakrar umrokeringar á liðnum høvdu við sær, at betri lá fyri hjá heimaliðnum í seinna hálvleiki.

Eyðvør úr Dímun leikti sín fyrsta dyst, síðan álvarsama skaðan á ólavsøku í fjør, og ikki var rúm tíð farin av seinna hálvleiki, so var vandamikli miðvallarin á plettinum. Annika Godtfred leggur eitt gottt hornaspark innfyri málið, og Eyðvør fær minka um munin við skallara til 1-2

HB trýsti eftir útjavnandi málinum, og miðskeiðis í seinna hálvleiki kom tað so. Unga Malan á Dunga var fyrst á bóltinum, eftir at GÍ-málverjin ikki fekk hildið einum innleggið, og so stóð á jøvnum.

### Heidi snýtti HB

Samanumtikið vóru HB-kvinnurnar betrií seinna hálvleiki, men tað skuldi enn einaferð verða Heidi Heinesen, ið skuldi geva HB-verjuni stórar trupulleikar. Stutt fyri leiklok vinna gøtukvinnur bóltin á miðjuni, og Heidi Heinesen strýkur ígjøgnum HB-verjuna, og leggur bóltin framvið Randi Wardum í málinum, og staðfesti harvið fyrsta GÍ-sigur í landskappingini í ár

Samanumtikið átti liðini hvør sín hálvleik, men úr Havn verður sagt, um nakar hevði uppiborið sigurin, so vóru tað helst gøtukvinnar, tí tær vóru raskari henda dagin. Havast skal eisini í huga, at HB vóru illa mannaðar henda dagin, og tað kann eisini hava havt sína ávirkan á úrslitið av dystinum.

**Dysturin í tølum:**
HB-GÍ 2-3 (0-2)
0-1 Anna Kristina Joensen br
0-2 Heidi Heinesen
1-2 Eyðvør úr Dímun
2-2 Malan á Dunga
2-3 Heidi Heinesen

# Skála leyp hvøkk á B68

**B68-venjarin væntar, at Skála fer at arga fleiri lið í landskappingini**

1. DEILD KVINNUR
*Páll Holm Johannesen*

**Málskjúttar í endaspælinum:**

| | | |
|---|---|---|
| Rannvá Andreasen | KÍ | 3 |
| Hansy Davidsen | B68 | 2 |
| Heidi Heinesen | GÍ | 2 |
| Eyðvør úr Dímun | HB | 1 |
| Malena Josephsen | KÍ | 1 |
| Anja Weihe | B36 | 1 |
| Anna Kristina Joensen | GÍ | 1 |
| Malan á Dunga | HB | 1 |
| Jóna Petra Thomsen | Skála | 1 |
| Poula D. Olsen | Skála | 1 |
| Elin Jacobsen | Skála | 1 |
| Majbritt Olsen | B68 | 1 |
| Anna Malena Højgaard | B68 | 1 |

| nr | felag | d | v | j | t | málúrtøka | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 1 | 1 | 0 | 0 | 4-1 | 6 |
| 2 | B68 | 1 | 1 | 0 | 0 | 4-3 | 4 |
| 3 | GÍ | 1 | 1 | 0 | 0 | 3-2 | 4 |
| 4 | B36 | 1 | 0 | 0 | 1 | 1-4 | 2 |
| 5 | HB | 1 | 0 | 0 | 1 | 2-3 | 1 |
| 6 | Skála | 1 | 0 | 0 | 1 | 3-4 | 0 |

Undan dystinum á Svangaskarði millum Eysturoyarliðini, B68 og Skála, mundi fáur vænta, at Skála-kvinnurnar kundi gera nakað við heimaliðið, men so skuldi ikki vera.

Skálakvinnur vóru bæði á odda 1-0 og 3-2, og vóru tær óhepnar at fara av aftur Toftum við ongum stigi.

Onkur hevði á máli, at um kvinnurnar av Skála høvdu havt størri royndir við 1.deildarfótbólti, so høvdu tær hildið fast um 3-2 leiðsluna.

### Oddva gjørdi munin

Av Toftum verður sagt, at leikferðin var høg, og talan var um ein góðan kvinnudyst. Heimaliðið hevði valt at byrja dystin uttan Oddvu Kristiansdóttir, tí hon hevði lítlan skaða at dragast. Oddvá kom ikki á vøllin, fyrr enn farið var undir seinna hálvleik, og tá fekk dysturin eina aðra gongd.

Spælið hjá heimaliðnum hekk als ikki saman í fyrra hálvleiki, og tær høvdu torført at fylgja við ungu og fótfimu Skála-kvinnunum.

Skála hevði yvirtakið í fyrra hálvleiki, har tær spældu seg fram til fleiri málmøguleikar. Heili fimm mál komu í fyrra hálvleiki- B68 fekk tvey og Skála trý.

Málini í fyrra hálvleiki fyri B68, skutu Hansy Davidsen og Majbritt Olsen. Málini hjá Skála skutu Jóna Petra Thomsen, Poula D. Olsen og Elin Jacobsen.

Í seinna hálvleiki lá betri fyri hjá toftakvinnum. Eftir at, Oddvá Kristiansdóttir varð sett á vøllin, og fekk heimaliði meira glið á spælið. B68-kvinnurnar spældu seg fram til fleiri møguleikar, og vóru eisini óhepnar við fleiri royndum á Skála-málið. Tvær reisur í seinna hálvleiki bjargaði tvørstongin Skála.

B68-trýstið gav eisini úrslit, tí í seinna hálvleiki fingu tær tvey mál aftrat, sum varð nóg mikið at tryggja teimum sigurin. Málið til 4-3 kom ikki fyrr enn tveir minuttir fyri leiklok, so uppflytarnir av Skála vóru óhepnar ikki at fáa nakað stig við sær. Málini hjá B68 í seinna hálvleiki fingu Anna Malena Højgaard og Hansy Davidsen.

### Vóna at fáa heiðursmerki

Av Toftum eru tey fegin um sigurin, men leggja dent á, at Skála avgjørt er eitt lið, ið ikki skal undirmetast. B68-venjarin, Hermann Jacobsen, var bilsin av avrikinum hjá útiliðnum, og hann er ikki í iva um, at Skála fer at arga fleiri lið í landskappingini í heyst.

Spurdur um hvat hann væntar av B68-liðnum í ár, svaraði Hermann, at hann vónaði at fáa heiðursmerkið, men enn var ov tíðliga at spáa um nakað.

**Dysturin í tølum:**
B68-Skála 4-3 (2-3)
0-1 Jóna Petra Thomsen
1-1 Hansy Davidsen
2-1 Majbritt Olsen
2-2 Poula D. Olsen
2-3 Elin Jacobsen
3-3 Anna Malena Højgaard
4-3 Hansy Davidsen





# Føroyingar megnaðu javnleik ímóti Danmark

**U–17 landsliðsvenjarin heldur, at hansara lið megnaði so mikið, sum tað kundir roknast við av teimum í Svøríki**

NM U–17 LANDSLIÐ
*Jóannes Hansen*



*Føroyska U17-landsliðið undan dystinum ímóti Onglandi*

U–17 landsliðið í fótbólti kom sunnudagin aftur til Føroya, eftir at teir í síðstu viku luttóku í NM kappingini í Svøríki. Sum sagt í leygardagsblaðnum, so taptu teir 4–0 bæði ímóti Onglandi og Noregi.

Síðsti dysturin í bólkaspælinum var fríggjakvøldið ímóti Svøríki, sum vann 3–1. Tað hevði við sær, at Føroyar skuldu spæla um sjeynda plássið ímóti Danmark. Uppgerðin endaði 1–1, men danir vunnu sjeynda plássið í brotssparkskapping.

– Afturlítandi kunnu vit ikki vera annað enn nøgdir. Vit spældu væl í 1. hálvleiki ímóti Onglandi, men í 2. hálvleiki vórðu vit orduliga settir upp á pláss. Ímóti Noregi fingu vit trý mál ímóti okkum eftir hornaspørk, sum vit einki fingu gjørt við. Fyri einum tíggju árum síðani vísti tað seg ofta, at føroyska liðið fór niður við nakkanum, sum kappingin leið, tí kreftirnar gingu undan. Gongdin og úrslitini ímóti Svøríki og Danmark vísir, at tann tíðin er farin, heldur Bill Jacobsen, sum er venjari hjá U–17 landsliðnum.

### Størsta trýstið ímóti Svøríki

Setningurin hjá svenska liðnum ímóti Føroyum var, at teir skuldu vinna í minsta lagið 5–0. So høvdu teir rokkið finaluna. Og føroyska liðið var ímóti Svøríki undir so stórum trýsti, sum teir ongantíð vóru í hinum dystunum.

– Teir komu á odda longu í 3. minutti, tá Jimmy Hellström úr IFK Norköping eftir uppspæl úr vinstru stóp púra leysur í málteiginum, men hóast teir trýstu okkum nógv og støðugt, so megnaðu okkara at halda teimum frá so nógvum uppløgdum møguleikum. Tíggju minuttir eftir stegðin øktu teir, tá vit mistu á miðvøllinum. Måns Sørensson úr Landskrona Boys fekk stikkbólt, og okkara málverji kom í millumstøðu. Tólv minuttir seinni øktu teir til 3–0. Aftur var tað Måns Sørensson, sum hesa ferð stútaði eftir innlegg úr høgru.

Bill Jacobsen heldur, at svenska liðið var ov álopssinnað, tá teir royndu at vinna stórt.

– Í staðin fyri at lokka okkara fram, so vóru teir faktiskt í 2–3–5 uppstilling, og tað bar ikki fleiri møguleikar við sær.

Føroyska liðið var um reppið at fáa mál í 12. minutti, tá Steffan Kallsø fekk stikkbólt fram ímillum og rann einsamallur ímóti svenska málinum.

– Hann hevði runnið einar fimtan metrar, áðrenn flaggið kom upp. Vit vóru ikki samdir í rangstøðudóminum.

Í yvirtíðini eydnaðist so at fáa mál. Mikkjal Hentze legði stikkbólt fram til Páll M. Joensen, sum rann frá verjuni og úr 16 metrum sendi flatt framvið málverjanum.

Ove Magnussen úr B68, sum kom á vøllin seint í 1. hálvleiki fyri skadda Boga Hermansen, varð kosin besti føroyski spælarin:

– Hann vísti sera góðan stríðsvilja og lyfti liðnum, heldur venjarin.

### Á sama støði sum danir

Ímóti Danmark gekk tað sambært Bill Jacobsen javnt á.

– Teir høvdu bóltin kanska 55 prosent av tíðini, og vit vóru ongantíð niðurspældir. Úrslitið var 1–1, og tað var týðuligt, at danir vóru vónbrotnir. Eg haldi ikki, at eg nakrantíð havi sæð eitt lið gjørt so skjótt av í umklæðingini eftir dystin, sum danska liðið gjørdi leygarmorgunin.

Danmark kom á odda í 7. minutti.

– Frederik Lassen úr Farum gjørdist púra leysur, tá hann fekk eina langa sending fram ímillum. Kanska var okkara verja ov frammarlaga í hesum førinum, og Gunnar í málinum var prísgivin, men tíbetur svaraðu okkara væl aftur.

Ofta hava føroyingar fingið mál ímóti sær í síðstu løtunum áðrenn hálvleik og í dystarenda. Men hesa ferð javnaðu Føroyar til 1–1 bara ein minutt undan hvíldini.

– Miðverjin Poul N. Poulsen steðgaði donskum álopi, so dró hann og sneiddi framvið tveimum, áðrenn hann spældi eitt tvey við Páll M. Joensen og kom einar tíggju metrar fram um miðjuna. Kanska hevði hann ikki so nógvar møguleikar at spæla tá, og so valdi hann at smekka til. Talan var um dreymaskot, og bólturin smoygdi sær dygst inn undir samankomingina.

Í 2. hálvleiki høvdu bæði liðini møguleikar, men tað var ikki at fara skeivur av, at føroyska liðið kendi tað sum sigur, tá dómarin bríkslaði fyri síðstu ferð, og støðan framvegis var 1–1.

Í brotssparkskappingini, sum avgjørdi 7. plássið, endaði Danmark omaná. Tað iðraðu føroyingarnir seg um:

– Eg segði við teir, at uttan mun til, hvussu tað fór at ganga í kappingini úr ellivu metrum, so kundu vit vera ernir av avrikinum. Men aftaná iðraðu vit okkum, tí málverjin hjá okkum Gunnar Nielsen bjargaði tveimum skotum, og vit høvdu í tveimum førum møguleika at avgera brotssparkskappingina okkum til fyrimunar.

Dagsins maður á føroyska liðnum í síðsta dystinum var Poul N. Poulsen.

### Ísland í finaluni

Føroyingarnir í Luleå vóru millum áskoðararnar, tá finalan ímillum Ongland og Ísland varð spæld. Ongland vann 1–0. Teir høvdu mest sum alt spælið, men tað gekk long tíð, áðren teir fingu málið.

Eftir vanliga leiktíð stóð á jøvnum, og so var neyðugt við longdari leiktíð og golden goal. Í síðstu løtu í fyrra umfarinum vóru íslendingar so óhepnir, at teir gjørdu sjálvmál.

– Íslendingarnir vóru sera raskir, men teir spældu ógvuliga verjukent. Faktiskt vóru teir í 1–4–4–1 ella kanska 5–4–1 uppstilling. Maðurin frammi á vøllinum var óførur, og uppskriftin var langar sendingar til hansara.

**Føroyar–Svøríki 1–3 (0–1)**

**Fríggjadagin 2. august 2002 kl. 18.00 á Björknäs vallen í Båden í Svøríki**

0–1: Jimmy Hellström 3.
0–2: Måns Sørensson 50.
0–3: Måns Sørensson 62.
1–3: Poul N. Poulsen 80.
Føroyar: Gunnar Nielsen, HB – Fritleif í Lambanum, ÍF, Jústinus Hansen, NSÍ, Poul N. Poulsen, VB, Jónas Þór Næs, HB – Bogi Hermansen, B36 (Ove Magnussen, B68, 39.), Jóhan Petur Poulsen, B68, Emil N. Leifsson, HB, Jóhan Eivind R. Mouritsen, HB (Teitur R. Joensen, Skála 64.) – Páll M. Joensen, HB (Símun Louis Jacobsen, GÍ, 80.), Steffan Kallsø, KÍ.

**Føroyar–Danmark 1–1 (1–1)**

**Leygardagin 3. august 2002 kl. 11.00 á Gammelstads Idrætspark í Luleå í Svøríki**

0–1: Jimmy Lassen 7.
1–1: Poul N. Poulsen 39.
Føroyar: Gunnar Nielsen, HB – Fritleif í Lambanum, ÍF, Jústinus Hansen, NSÍ, Poul N. Poulsen, VB, Jónas Þór Næs, HB – Ove Magnussen, B68, Jóhan Petur Poulsen, B68, Emil N. Leifsson, HB, Jóhan Eivind R. Mouritsen, HB (Mikkjal Hentze, B71, 56.) – Páll M. Joensen, HB, Steffan Kallsø, KÍ.

Aðrir spælarar í ferðalagnum vóru Heini Christiansen, Skála, Kristian Mouritsen, HB, Urbanus Olsen, KÍ, Teitur R. Joensen, Skála, Símun Louis Jacobsen, GÍ, Bogi Hermansen, B36